Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður

Evni: Makrelkvotur

Spurningar:

1. Hvat grundarlag verður nýtt fyri at býta nýggju makrelkvoturnar, tey 60.000 tonsini?
2. Fer landsstýrismaðurin at luta út kvotur til viðkomandi fiskivinnuverkætlanir í Sandoynni, Norðstreymoy og Suðurstreymoy, nú kvotupartur okkara av makrelinum hækkar?
3. Um ikki, við hvørjum grundgevingum velur landsstýrismaðurin ikki at geva áðurnevndu økjum ein møguleika at menna vinnuvirksemi grundað á nýggja tilfeingið av makreli?

Viðmerkingar:
Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur boðað frá, at makrelkvoturnar verða hækkaðar, nú eingin strandalandasemja er í eygsjón í ár.

Harvið áseta strandalondini sína egnu kvotu, og taka ikki hædd fyri tilmælunum frá ráðgevandi fiskifrøðini.

Fyri Føroyar merkir tað, at nýtt tilfeingi svarandi til 60.000 tons, ella eitt avreiðingarvirði á oman fyri 300 mió.kr. afturat, verður tøkt hjá føroyskari fiskivinnu at fiska.

Rættindini til havsins ríkidømi eru landsins ogn, og sum er verða tey býtt sera ymiskt millum landsins øki.

Serliga loypir í eygað Sandoyggin, Norðstreymoy, og Suðurstreymoy, sum ikki hava fingið sín rímiliga lut av tilfeinginum. Hetta kann vera óheppið fyri hesi øki, havandi í huga, at vit øll eiga fiskin, sum í havi okkara svimur.

Nú er eitt gylt høvi hjá landsstýrismanninum at menna uppsjóvarfiskiskap í Sandoynni, Norðstreymoy, og Suðurstreymoy; tí hesar spurningar.

Á Løgtingi, 11. juni 2021

Páll á Reynatúgvu